# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Minningarorð um okkara elskaða abba og langabba,

## Andreas í Velinum

### 31. mars 1917 - 16. februar 2005



Góði abbi.

Hóast vit vistu, hvønn veg tað bar, vóru boðini tung at fáa um, at tú vart farin foldum frá. Eftir einum langum og virknum lívi á sjógvi og á landi fór heilsan hjá tær at bila tað seinasta árið, tú livdi. Sjálvt um tú vart mettur av døgum, vart tú fyri okkum sami góði og umsorgarfulli abbi.

Nú tankar okkara leita aftur til barndómsárini, minnast vit mangar góðar løtur heima hjá tær og ommu uppi á Brekku. Vit vóru altíð væl móttikin, og fyrsta tú segði var altíð: »komið og fáið tykkum at eta«. Omma var beinanvegin klár og fór upp at stákast.

Tú visti nógv at fortelja frá tínum barnaárum og tínum langa lívi á sjónum. Tá vit undraðust á, hví tú nærum onki hár hevði á høvdinum, segði tú okkum, at tú átti fýra døtur og ein dagin, tá tú stóðst á brúnni á Albert Victor, og tú fekst boðini um, at sonurin var føddur, leypst tú upp, smekkaði høvdið í loftið, og hárið hekk eftir. Hesum trúðu vit sjálvandi og hava mangan flent at síðan.

Tey árini, tú sigldi, minnast vit gleðina, tá tú komst heim, og altíð hevði tú tinganest og karamellur við. Møttu vit tær, tá tú komst spákandi eftir vegnum í keppi og gummiskóm, hendur í lumma og við fullari skuffu av snúsi, átti tú altíð eina karamellu ella eitt oyra at geva okkum. Lógu vit sjúk, var eitt tað besta, vit vistu, at tú komst at vitja og hevði okkurt gott við. Tú hevði sjálvur tokka til tað søta og koyrdi tú onkuntíð súltutoy í teið og sukurmolar í røstu súpanina. Tú vildi altíð hjálpa, og tá vit egndu, var tað mangan, tú tókst yvir og gjørdi stamparnar lidnar.

Tú vart musikalskur og spældi orgul. Tú hevði fyri at siga: »kom og lær teg at spæla orgul, so skalt tú eiga tað, tá abbi er deyður«. Eisini hevði tú gott mál, og tú sangst ofta fyri okkum.

Eftir samfullum 56 árum á sjónum, legðist tú uppi á landi, og vit minnast væl ta fyrstu tíðina, hvussu tær ofta longdist á sjógvin. Tú fórst tó skjótt í gongd við at finna tær annað at takast við, og varð tað seyðin hjá Olaf-beiggja, tú brúkti tína tíð uppá. Tú gekst upp í hetta arbeiðið við lív og sál, og vart ein umsorgarfullur seyðamaður. Tú gleddi mangt langabbabarn við at ogna teimum ein seyð. Omma og tú livdu saman í 60 ár í hjunarbandi, og tit vóru ein góð fyrimynd fyri okkum. Tit vístu okkum altíð kærleika og umsorgan, og frá tykkum vita vit, at lívið ikki bara er ein dansur á rósum. Tit tagdu ikki nakað burtur, og vóru tað trupulleikar í gerandisdegnum, hoyrdu vit tykkum kjakast og finna eina loysn. Vit meta, at hetta hevur givið okkum nógv og styrkt okkum fram í lívinum. At gleði og sorg ofta fylgjast, var eyðkent hjá tær. Tú gjørdist ofta rørdur og feldi mangt gleðitár.

*Lag:*
*»Góða mamma eg vil sova«.*

Góði abbi ei vit gloyma
alt tú lærdi okkum her
djúpt í hjartanum vit goyma
nú tú ei hjá okkum er

Hann ið okkum øllum ræður
styrkja okkar ommu má
tungur verður mangur dagur
tí tú ei ert henni hjá
Góði abbi vit tær siga
at vit ommu verða hjá
og vit lova hjartaliga
hon ei sita eina má

Góði abbi hvíl í friði
okkar heilsan til tín er
vóna og til Guð vit biðja
møtast aftur einaferð

Góði abbi, saknurin í tær er stórur.

**Abba- og langabbabørnini**

# Valborg Sivertsen Norðdepli 75 ár



Í dag, leygardagin 26. februar, fyllir Valborg Sivertsen í Norðdepli 75 ár. Hon starvaðist í mong ár á Sjúkrahúsinum og Røktarheiminum í Klaksvík.

Valborg er ættað úr Svínoy. Foreldrini vóru Anna og Jóannes Joensen, sum var bóndi í Heimistovu. Anna var dóttur Ingu og Símun Júst Jacobsen, sum var læraralærdur og eisini hevði handil. Hann var eitt skifti løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin.

Anna og Jóannes áttu sjey børn: Jógvan, Hans Jacob, Ragnhild, Símun, Valborg, Ingibjørg og Fríðgerð. Jógvan og Fríðgerð búgva í Svínoy, Ragnhild og Ingibjørg búgva í Klaksvík, og Valborg býr í Norðdepli. Hans Jacob og Símun, sum báðir eru farnir, búðu í Klaksvík.

Seint undir krígnum fór Valborg til Klaksvíkar. Hon var í húsinum hjá Odu Kjølbro, og hon arbeiddi eisini í matvøruhandlinum hjá Kjølbro á Biskupsstøð. Eftir at hava verið á Háskúlanum, fór hon 1. oktober í 1950 at læra til sjúkrasystur á Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Hon var liðug við læruna og lesturin í 1954. Tá hevði hon í tíggju mánaðir verið og supplerað á Skt. Hans og Skt. Josef í Danmark.

Eftir at hon var komin aftur til Føroya, arbeiddi hon á sjúkrahúsinum í Klaksvík eitt skifti.

28. desember í 1955 giftist Valborg við Hans Jacobi Sivertsen í Norðdepli. Tey búsettust í Norðdepli, har Hans Jacob var útróðrarmaður.

Tey fyrstu árini í Norðdepli var Valborg heimasjúkrasystur. Hon ferðaðist við læknunum í Klaksvík í útoyggjarnar. Tá ið tunnulin var komin til Klaksvíkar seinnapartin av seksti árunum, fór Valborg aftur at arbeiða á sjúkrahúsinum. Har var hon, inntil Røktarheimið í 1984 varð tikið í nýtslu. Tá fór hon í starv har, og Valborg var á Røktarheiminum, inntil hon í 1995 gavst at arbeiða.

Valborg og Hans Jacob eiga fýra børn: Poul Sivert, Anna Maria, Jóannes Dánial og Ásmund. Dreingirnir búgva allir í Norðdepli, og Anna Maria býr í Havnini. Tann fyrri Osmundur var trý ára gamalur, tá ið hann í 1963 druknaði.

Tað hevur altíð verið lív í, har Valborg hevur verið. Hon er ófør at siga frá, og hon megnar at seta dám á, har hon er. Mong eru tey, sum hava sitið væl í heiminum hjá henni og Hans Jacobi í Norðdepli. Vit eru mong, sum heilsa henni á 75 ára degnum.

JH

Valdemar Lützen, Byggibúð:

# Ókeypis kaffi og kakao á Skálatrøð

Í byggibúðini hjá Valdemar Lützen á Skálatrøð er nú ein kafékrókur gjørdur, har øll eru vælkomin at fáa sær ein ókeypis kaffimunn ella kakao. Møguleiki er eisini at fáa eitthvørt søtt til góman. Eisini er ein sera áhugaverd røð av gomlum myndum, sum eru tiknar á Skáltrøð og í Vágsbotni.

So nú er møguleiki at steðga eitt sindur á hjá kundum, ið leita sær inn í Byggibúðina.

Tað at Byggibúðin bjóðar eitt stórt úrval innan amboð, urtagarðin, fiskireiðskap, o.a., ger at kundarnir kunnu taka sær góða tíð at finna røttu vøruna - við einum kaffimunni í hondini. Tørvur er á eini slíkari tænastu á Skálatrøð, sigur Høgni Lützen, stjóri hjá Valdemar Lützen Byggibúð, ið leggur afurat at hann ikki veit um aðrar Byggibúðir ið kunnu bjóða slíka tænastu – og við einum tílíkum umhvørvi.



*Kundar sita og hugna sær í hugnaliga kafékrókinum, við áhugaverdum gomlum myndum hjá Valdemar Lützen Byggibúð á Skálatrøð*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Nógv virksemi er á Skálatrøð og nógv fólk hava dagliga gongd á økinum og við bátabrúgvarnar, og hjá teimum kann tað vera sera hent at seta seg niður við einum kaffimunni og nýta útsýnið yvir Havnarvág og hyggja at gomlu myndunum. Tað finnast ikki nógv vakrari og meira veðurgóð øki í Havnini, enn tað Skálatrøð kann bjóða.

Umráðandi í dag er at handlarnir í Havnini kunnu bjóða kundunum allarbestu tænastuna. Hetta leggja vit sera stóran dent á, og saman við tí kunnu vit bjóða viðskiftafólki okkara eina breiða viftu av ymiskum møguleikum. Hetta tí at kundarnir hava størri krøv í dag enn fyrr til góða og dygga tænastu til ein skilagóðan prís. Tað er upp á tíðina at tænasta er raðfest hægri nú, tí tað í alt óv stóran mun og í alt ov langa tíð hevur verið raðfest sera lágt innan byggimarknaðarvinnuna í Føroyum, sigur Høgni Lützen.

Kafékrókurin er fyri øll, og ikki einans fyri tey sum keypa í handlinum, øll eru vælkomin at fáa sær ókeypis kaffi og kakao. Vónandi vilja fólk sum heild taka væl ímóti hesum nýggja tiltaki og leita sær oman »har ið sólin og sjógvurin møtast« verður sagt úr Byggibúðini á Skálatrøð.